## Bilradio hósdagin kl. 16.10

Í sendingini er prát við Agnar Joensen frá ATV Mountain um koyring við ATV í fjøllunum og í haganum nærhendis Vestmanna. Eisini er ein samrøða við Óla Mortensen frá Sp/f Triv, sum fortelur um síni 25 ár við traktorum og sláimaskinum. Samrøða er eisini við Poul Laust Christiansen frá Bil.fo.



Agnar Joensen (t.v.) og Magnus Gunnarsson

# Skráin hjá Rás2

Send heilsanir til Ynskiløtuna á www.ras2.fo ella SMSa á 52 00 00

### Týsdagur 9. feb.

15:00 Tíðindi
15:15 Kærleiksballadur
16:00 Tíðindi
16:05 Kærleiksballadur
17:00 Tíðindi
17:20 Tónleikur
18:30 Tíðindi (e)
18:45 Tónleikur
21:00 Á Torginum – Gestir verða hjúnini Kirstin Hans Elmar Poulsen úr Vatnsoyrum Vertur verður Absalon Absalonsen
22:00 Tónleikur
00:00 Liðugt

### Mikudagur 10. feb.

07:00 Tónleikur
09:00 Morgunsending – Eyðun Klakstein og Mirjam Pætursdóttir eru vertir
11:00 Tíðindi
11:15 Morgunsending
12:00 Tíðindi
12:15 Tónleikur
13:00 Ynskiløtan
15:00 Tíðindi
15:15 S&S – Spurnarkapping
16:00 Tíðindi
16:05 Shop Top – Alvin Ellebye Andersen leggur til rættis
17:00 Tíðindi
17:20 Tónleikur
18:30 Tíðindi (e)
18:45 Tónleikur
00:00 Liðugt

### Hósdagur 11. feb.

07:00 Tónleikur
09:00 Morgunsending – Barbara Holm og Mirjam Pætursdóttir leggja til rættis
11:00 Tíðindi
11:15 Morgunsending
12:00 Tíðindi
12:20 Hitttónleikur
13:00 Ynskiløtan
14:00 Lýsingar
14:05 Ynskiløtan
15:00 Tíðindi
15:05 Rockballadir
16:00 Tíðindi
16:10 Bilradio – Magnus Gunnarsson skipar fyri
17:00 Tíðindi
17:20 Tónleikur
18:30 Tíðindi (e)
18:50 Tónleikur
00:00 Liðugt

RÁS ...títt radio

### Firmakapping á Rás2

Hvønn mánadag og fríggjadag kl. 11.15




## Amariel á vitjan

Í Morgunsendingini mikudagin fáa vit vitjan av listamanninum Amariel Norðoy. Hann telist millum teir mest virknu føroysku listamálararnar og hevur framsýningar bæði heima og úti. Í ár hevur hann longu verið av landinum vikð málningum, og fríggjadagin letur hann upp framsýning í Havn. Prátað verður við Amariel um, hvar hann er í síni málingalist í løtuni, og hvørjar tankar hann ger sær um síni egnu verk.

Vinningurin í S&S hesaferð:

# Familjupakki til Summar Festivalin

Í S&S kanst tú nú vinna ein familjupakka til Summar Festivalin 2010. Føroya størsti festivalur verður hildin í Klaksvík í døgunum frá 5. til 7. august, og á pallinum verða kend útlendsk og føroysk nøvn.

Hetta er sjeyndu ferð, at Summar Festivalurin verður hildin, og tiltakið hevur í fleiri ár verið tað størsta av sínum slagi í landinum. Aftur í ár verður lagt upp til ein stóran festival við spennandi tónleikabólkum, sum fara at undirhalda í tríggjar dagar.

Í S&S kanst tú vinna fýra vikuskiftispass – tvey til vaksin og tvey til børn

Fyri at vera við í kappingini, skalt tú senda SMS-boðini »SoS« til 1940 (prísurin er 30 kr. fyri hvørt sms).

Lutakast verður millum øll tey, sum hava sent inn, og tey, ið sleppa við í sendingina, skulu svara 10 spurningum í almennari vitan. Tvær ferðir kanst tú fáa hjálp at svara. Klárar tú ígjøgnum spurnarkappingina, er vinningurin tín.




Summar FESTIVALUR